

# EWOS sigur fólki úr starvi

Norski fiskafóðurframleiðarin, EWOS AS, sum vit eisini kenna her í Føroyum, ætlar í fyrsta ársfjórðingi í 2007 at minka um talið av starvsfólki í fyritøkuni við umleið 30-40 fólkum.

Felagið miðjar eftir at effektivisera fyritøkuna, soleiðis at kappingarføri verður betri - og raksturin bíligari.

Átakið fevnir um allar deildir hjá felagnum í Noregi, og ætlanin er, at kostnaðarsparingin í 2007 skal verða einar 15 mió norskar krónur. EWOS AS hevur í dag 230 fólk í starvi, og marknaðarparturin hjá felagnum í Noregi sum veitari av fiskafóðuri er 37%.

Í ár fer felagið at seta framleiðslumet við eini øking í framleiðsluni av fiskafóðuri upp á 10% samanborið við árið í fjør.

Í tíðindaskrivi herfyri segði stjórin í fyritøkuni, Geir Molvik, at EWOS framhaldandi ætlar at vera leiðandi fyritøkan í Noregi sum útbjóðari av fiskafóðuri. - Tað ætla vit eisini í framtíðini, sum verður merkt av vøkstri og uppaftur størri kapping, leggur stjórin aftrat. So hvørt, sum fólk í fyritøkuni fella fyri aldursmarkinum, er ætlanin, at uppaftur færri fólk skulu starvast hjá EWOS AS í Noregi.

**-vilmund.**



*Søren Havmand er stjóri í P/F Føroya Troli og verfaðir hansara, Helgi Brekku, er nevndarformaður*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

# Hampiðjan ein av átta partaeigarum í P/F Føroya Trol

**Partapeningurin í P/F Føroya Trol var 2,3 miljónir krónur, sum er býttur millum átta partaeigarar – sjey í Føroyum og ein í Íslandi. Íslendski partaeigarin er eftir føroyskum mátistokki ein risi innan trolvirksemi**

FØROYA TROL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Átta partaeigarar standa aftanfyri felagið, P/F Føroya Trol, sum hevur heimstað í Vestmanna.

Teir, sum eiga felagið, eru P/F Meðalsbrekka, Vestmanna, Sp/f AHJ 2004, Tórshavn, P/F JFK, Klaksvík, H/F Hampiðjan, Reykjavík, Søren Havmand,Tórshavn, René Havmand, Tórshavn, Herman Brekku, Tórshavn og Jón Brekku, Tórshavn.

Nevndarformaður er Helgi Brekku. Hinir í nevndini eru Tummas Christophersen, Hanus Hansen, Herman Brekku, Søren Havmand, og síðan er eisini eitt umboð fyri H/F Hampiðjan í nevndini.

Søren Havmand er stjóri í felagnum.

### Tríggjar orsøkir

Felagið keypti fyri einum ári síðan ein stóran bygning inni á Fjørð í Vestmanna – bygningin, sum vestmenningar rópa Snikkaravirkið.

Gólvvíddin er umleið 1900 fermetrar.

Fiskivinnuskúlin leigar hølir í bygninginum, og verður skúlin verandi har, til nýggjur skúli er bygdur.

Stigtakararnir til P/F Føroya Trol siga, at tríggjar orsøkir vóru til, at nýggja trolvirkið kom at liggja í Vestmanna.

– Tummas Christophersen er sum kunnugt vestmenningur, og hann er sera áhugaður í, at virksemið økist í Vestmanna. Sjálvur eigur hann saman við øðrum fleiri trolarar.

Søren Havmand og Helgi Brekku, stjóri og nevndarformaður, siga, at leitað varð leingi eftir egnaðum hølum til trolvirkið.

- Møguleikar vóru kanska at byggja í Havn, inni á Sundi ella í Kollafirði, men hetta hevði tikið tíð - og hevði verið kostnaðarmikið. Tá ið Tummas vísti á møguleikarnar í Vestmanna, varð farið í gongd við at ogna sær eini av húsunum, sum standa inni á Fjørð.

Ein triðja orsøk til, at virkið liggur í Vestmanna, siga teir báðir er, at bygdin altíð hevur verið ein trolarabygd burtur av.

- Nógvir trolarar hava gjøgnum tíðirnar verið heimahoyrahoyrandi í Vestmanna, og tí eru tað nógvir vestmenningar, sum duga at fáast við trol.

### Hampiðjan ein risi

Sum stigtakarar til virksemið, fegnaðust Søren og Helgi um at hava fingið tveir so royndar skiparar og vinnulívsmenn, sum Tummas Christophersen og Hanus Hansen, við. Teir hildu nevniliga, at teirra royndir, bæði á sjógvi og landi, eru gull verdar fyri eitt virkið sum hetta. Annars eru allir føroyingarnir í felagnum royndir trolmenn - við undantak av nevndarformanninum.

Stigtakararnir siga, at íslendska fyritøkakan, Hampiðjan eftir føroyskum viðurskiftum er ein risafyritøka innan trolvirkið við virksemi í fleiri londum.

- Samstarvið við Hampiðjuna letur fleiri dyr út í heimin upp fyri okkum. Fyri tað fyrsta fáa vit atgongd til innkeyp av rávøru til sámiligar prísir, eins og vit hava fingið lykilin til úthurðina á stóru verksmiðjuni, sum Hampiðjan eigur í Litaviu – og í hesum liggja stórir møguleikar.

# P/f Føroya Trol h

**- Tað er eingin loyna, at kappingin á hesum marknaði, sum vit bjóða okkum fram á, hevur verið rættiliga hørð, síðan vit fóru í gongd. Prísirnir á botntrolum hava verið lágir – ja, eini 20-25% lægri, enn teir vóru, áðrenn P/F Føroya Trol sá dagsins ljós**

FØROYA TROL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um hann fekk sær eftirnavnið Havmand, tí hann er føddur við saltvatni í blóðinum – ella um gamla eftirnavnið í faðirættini hevði nakra ávirkan á, at hann alt sítt lív hevur fingist við trol, skulu vit í hesi greinini lata vera ósagt.

Og tó.

Vit kunnu í hvussu er avdúka, at hvørgin gitingin er røtt, tí eftirnavnið Havmand hevur leingi verið í ættini.

Men Søren Havmand er so navnið á manninum, sum saman við øðrum fyri einum sløkum ári síðan legði lunnar undir nýggja trolvirkið í Vestmanna, P/F Føroya Trol.

### Eitt lítið ár

Tað var í desember mánaða í fjør, at teir byrjaðu at rigga til í stóra bygninginum Inni á Fjørð í Vestmanna, sum vestmenningar rópa Snikkaravirkið. Bygningurin varð keyptur til endamálið.

Longu í januar í ár fóru teir so smátt í gongd við at gera tey fyrstu botntrolini til føroyska feskfiskaflotan.

Men hvussu hevur so gingist, síðan P/F Føroya Trol fór í gongd í Vestmanna?

Søren Havmand, sum var í starvi hjá P/F Vónini í Havn í 21 ár og var leiðari fyri botntrolum hjá felagnum í eini 16-17 ár, letur væl at gongdini, samstundis sum hann ásannar, at kappingini á marknaðinum hevur verið hørð.

- Vit kunnu ikki lata illa at, tí vit hava havt nógv at gera, síðan vit byrjaðu. Sum í øllum øðrum vinnum, er trolarbeiði eisini merkt av sesongarbeiði, har oftast er mest at gera rundan um ársskiftið og út á heystið. Hetta hevur helst nakað við tað at gera, at reiðaríir leggja sínar fíggjarætlanir og virka hareftir í tann mun, tað letur seg gera.

### Hørð kapping

Hann sigur, at á trolmarknaðinum er tað soleiðis, at tú í ein ávísan mun noyðist at uppsøkja arbeiði sjálvur, tá ið minni er at gera.

- Tað er ikki altíð, at tað kemur av sær sjálvum, og stundum noyðist tú út á markina at bjóða teg fram, sum hann tekur til.

Søren Havmand vísir á, at flestu reiðaríir vita, hvat tað er, tey vilja hava, tá ið tey koma, og síðan verður biðið um tilboð.

- Tað er eingin loyna, at kappingin á hesum marknaði, sum vit bjóða okkum fram á, hevur verið rættiliga hørð, síðan vit fóru í gongd. Prísirnir á botntrolum hava verið lágir – ja, eini 20-25% lægri, enn teir vóru, áðrenn P/F Føroya Trol sá dagsins ljós.

Millum eigararnar av trolvirkinum í Vestmanna eru eisini tvey feløg, sum hava trolarar. Tey eru felagið hjá Tummasi Christophersen í Vestmanna og felagið hjá Hanusi Hansen í Klaksvík.

- Tað er tó ikki soleiðis, at vit sleppa at gera alt fyri skipini hjá hesum feløgum – bara tí, at tey eiga í P/F Føroya Trol. Vit noyðast til eina og hvørja tíð at vera kappingarførir við okkara kappingarneytar – og soleiðis eigur tað at vera, sigur hann.

### Kapping í lagi

Søren Havmand vísir á, at teir hava gjørt trol til fleiri onnur skip og reiðaríir



enn til skipini hjá teimum báðum feløgunum, sum eru parteigarar.

– Ja, vit hava longu nú arbeitt fyri nógv reiðaríir kring landið, undantikið í Suðuroy, har felagið Bergið leingi hevur átt marknaðin, sum ger trolini til djúpvatnstrolararnar í oynni.

Hann heldur, at tað er sunt fyri vinnuna, at kapping er á marknaðinum, og hetta sæst so sanniliga eisini aftur í prísunum.

- Hetta ger, at feløgini, sum framleiða til marknaðin, ikki standa í stað, men